# Kjak

Birgit Clementsen

## Álitið á býráðið rokið ein túr...

Fyri trimum mánaðum síðani komu tveir m enn frá Tórshavnar kommunu inn til mín og søgdu, at eg skuldi út úr íbúðini í tvær vikur til ein mánað, ímeðan tryggingin umvældi ein vatnskaða, og tað skuldi verða beinanveg, mær nýttist einki at taka við mær, bert klæði. Møblar og tílíkt skuldi eg ikki hgusa um, tað kundi bara standa, tað snúði seg bert um nakað, sum var skjótt at gera.

Eg hevði ein frens, sum var mítt kelidjór, og eg lat teir vita, at eg fór ongan veg uttan hann. Tá eg kom í tryggingaríbúðina kundi eg ikki hava frensin, tí tað var ikki loyvt at hava kettu ella hund har, so eg mátti siga monnunum um støðuna, tí eg fór altso ikki nakran veg uttan frensin. Svarið frá teimum var bert, at eg kundi ganga heim í íbúðina og mata hann, so tað mátti eg so gera. Eg svav eisini inni hjá honum um náttina og slapp honum so út um morgunin klokkan 7:30, tá eg sjálv fór, men tað sá ikki so gott út, sum dagarnir gingu, tað bleiv meira og meira brotið niður í íbúðini, bert eitt lítið pettið eftir av stovugólvinum, har sofa og annað var skramblað saman, og eitt petti av sama slag í sovikamarinum. Hvat skuldi hetta til fyri ein lítlan vatnskaða á WC gólvinum og ein undir køksvaskinum? Tað skilti eg ikki, bæði eg og frensurin, ið eitur Nati, fødu okkum illa tilpass.

Tá eg fór at ótolnast og spyrja, fekk eg bert eina ósannheit fyri og aðra eftir. Nú hevði íbúðin staðið sum ein ruin í tveir mánaðir, og eingin arbeiðsmaður at síggja. Hann hevði bert brotið alt niður í íbúðini og síðan rýmdur, nú skuldi eg eisini út aftur úr íbúðini hjá tryggingini. Og eg var nú vorðin eitt mál hjá Trivnaðarnevndini í Tórshavnar kommunu, har fekk eg so eitt stað at bíða í framvegis, og har kundi eg endiliga hava Nati við mær, men tað, sum nú hendur, nú eg skal flyta við Nati, nú er hann ikki at finna, hann er blivin vekk, má eg konstantera, havi leitað og rópt og gjørt alt eg kann, men hann er ikki komin enn, eg sovi enn í ruinini, men nú tí at eg bíði eftir, at hann skal koma aftur, so eg kann taka hann við mær í tað nýggja bíðistaðið, sum faktiskt er 50 ferðirnar verri standi enn mín íbúð nakrantíð var. Tað eru meira enn tríggir mánaðir síðani, at hesir báðir menninir frá Tórshavnar kommunu komu hin ringa dagin og skryktu teppið undan beinunum á mær. Nú spyrji eg ikki meira. Tað ganga søgur um húsið av einum og øðrum slag, eg havi einki fingið at vita uttan ósannheitir. Ongantíð informerað um íbúðirnar og enn gjaldi eg høvnn mánað, sum stendur utttan vatn, uttan WC, uttan gólv.

Í morgun tá eg skuldi fara og levera lesarabrævið, kom Nati aftur, men hann so ikki gott út, innholaður vigaði næstan sum ein sigarettpakki, fekk medisin frá djóralæknanum beinanvegin, og um fimm dagar skuldi hann verða komin fyri seg aftur. Hann hevur tað gott nú, liggur her og knurrar hjá mær í tí nýggju íbúðini.

P.s. Mítt álit til Tórshavnar kommunu hevur rokið sær ein túr og kemur neyvan aftur. Hetta er tað ringasta, sum nakrantíð er gjørt ímóti mær.



Óluva Klettskarð

## Eg fegnist um skattalætta...

Nú meldaði meirilutin í Klaksvíkar býráð út, at tey hava ætlanir um at lækka skattin fyri komandi skattaár, og eg má bara siga hvussu stórliga eg gleðist um hetta. Hesa ferð vænti eg ikki, at tørvur verður á at fáa minnilutan at taka undir at fremja lækkingina, eins og neyðugt var, tá skattaprosentið varð hækkað á sinni.

Sjálv havi eg hildið borgarar í Klaksvíkar kommunu goldið ov nógv í skatti samanborið við tænastustøðið; og havi nakrar ferðir havt tað á orði í býráðssalinum, at skattaprosentið eiga vit at lækka. Men røktarheimið var vert eina lítla skattaøking, og tí tók minnilutin undir við hesum. Tí kommunan er rættiliga illa fyri á eldraøkinum, og tá landspolitikarar spældu kortini út, so valdu vit at spæla við. Men nú fíggjarumstøðurnar í kommununi er so nógv broyttar, og kommunan hevur methøga fíggjarætlan, so er onki alternativ enn at lækka skattin, sjálvandi.

At tørvur er á hjá politikarum at gera vart við seg og hugsjónir sínar er ein sjálvfylgja; meirilutin í býráðnum hevur fyrr havt tørv á at statuera seg sum sjálvstøðugan part í býráðnum, onki forgjørt er í tí. Hinvegin er tað rættiliga skemtiligt, at politikarar, ið stillaðu upp og agiteraðu harðliga ímóti tí høga skattatrýstinum, so skjótt samdust um at hækka tað! Og borgarar eru longu farnir at skemtast við, at tá peningurin nú er brúktur, so er lagað manni at lækka skattin, nú býráðsskeiðið er um at vera runnið.

Men guds barnið batnar. Sjálv haldi eg tað vera skilagott og av størsta týdningi at lata býráðsarbeiðið og búskapin í kommununi til komandi politikarar í helst nógv betri standi, enn tá veljarin seinast setti kross og lat politikarar umsita skattaborgarans pening. Og tað ber altíð til at kjakast um, hvør er móður at einum uppskoti, ella hvør er faddur. Hetta leggi eg ikki so nógv í, mítt íkast hevur alla tíð veri at fremja positiv mál, sum eg sjálv trúgvi upp á.

Sjálv fegnist eg um, at skúlin hevur fingið rívan av fíggjarætlanini, øll hesi árini, Skúlin við Ósánna er um- og nýbygdur. At røktarheimið og harvið eldraøkið hevur fingið sítt er onki minni enn eitt bragd. Men rættiliga skilagóða íløgan uppi í Djúpumýru, nú vøllurin í Klaksvík verður gjørdur av nýggjum, kann ikki yvirmetast. Hóast nógv størri íløga kundi verið gjørd har, so eigur og skal mest brúkti vøllur í Føroyum og størsta spæliplássið í býnum sjálvandi hava bestu kor. Onki annað kann góðtakast.

Men enn liggja stór tøk fyri framman, tí skúlaøkið er als ikki nøktandi, samstundis sum seriøsar ætlanir eru um at fáa mentanarhús í býnum um ikki alt ov nógv ár. At fáa Skúlan á Ziskatrøð í nýtiligan stand verður eitt tak, komandi politikarar eiga at taka í størsta álvara. Og lætt verður tað ikki, tá kappingin eisini fer at standa í mun til spillvatnsætlanina, ið kostar einar 80 mió.

Sum sagt, so fari eg at taka undir við skattalættanum og halda fram á somu leið: at søkja semju og at skapa tilboð til borgaran fyri mest møguliga úrtøku...



Jógvan Arge
*formaður í mentamálanevndini í Havn*

## Væleydnaður leikur í Perluni

Ungdómurin á Margarinfabrikkini í Havn hevði eina væleydnaða frumframførslu í Perluni leygarkvøldið. Leikurin, sum ungdómurin sjálvur hevur skrivað og sett upp saman við serkønum, var hugvekjandi og væl úr hondum greiddur.

"Kennir tú Margar" er leikur við tónleiki, sjónleiki, sangi og dansi. Tey ungu á Margarinfabrikkini syrgja fyri øllum hesum í eini góðari samansjóðing.

Innihaldsliga snýr leikurin seg um forelskilsi, hjartasorg, yvirstremban, hjúnaðarskilnað, keðsemi og bólkin mótvegis tí einstaka.

Ein stóran part av vetrinum hava eini 50 ungdólk



arbeitt við verkætlanini. Tað stóra takið man hava verið at avgera, hvørji evnini í leikinum, skuldu vera, og hvussu tey skuldu viðgerast.

Meginparturin av tí talaða innihaldinum var tikin upp á video, har tey ungu søgdu sínar ymisku hugsanir um tey ymsu evnini. Hesar videomyndir verða so vístar og kryddaðar við leiki og sangi, dansi og ymsum rørslum á gólvi, palli, í trappum og uppi á svalanum.

Tey ungu seta sær nógvar spurningar um lívið, sína familju, sínar vinir og seg sjálvan. Ein av setningunum, sum kom fyri í leikinum, var, at tú veitst ikki, hvussu tú ert, fyrrenn tú ert vorðin eitt annar.

Leikurin verður tikin upp aftur fleiri ferðir hesar komandi tvær vikurnar, og vit kunna ikki annað enn viðmæla, at fólk fer sær ein túr oman í Perluna at lýða á.

Hetta er størsta verkætlan, sum Margarinfabrikkin hevur tikið stig til nakrantíð. Endamálið er at seta fokus á kenslur og ungdómslív, samstundis sum tey ungu fáa víst sínar listarligu gávur.

Starvsfólkini í Margarinfabrikkini Petur Háberg, tónleikari, Beinta Clothier, sjónleikari og Gunn Joensen, dansari hava staðið aftanfyri tey ungu um verkætlanina.